# Kunning um upptøkuroynd til løgfrøði

Umsøkjarar til upptøku á MA (Master) í løgfrøði summarið 2022 og umsøkjarar í 2022 til Emb.L (embætisprógv) summarið 2022, ið koma frá øðrum lærustovnum í danska ríkinum enn Fróðskaparsetrinum, skulu møta til upptøkuroynd **mikudagin 29. juni 2022, kl 10-14**. Royndin verður hildin á veghæddini á Søgu- og samfelagsdeildini, Jónas Broncksgøtu 25.

Upptøkuroyndin telur saman við bachelorprógvum, viðkomandi royndum og eftirútbúgvingum v.m. í metingini av, hvør er skikkaður til upptøku. Umsøkjarar mugu tó í minsta lagi standa upptøkuroyndina við próvtalinum 7.

## Endamálið við royndini

At lesa lóg snýr seg ikki einans um at minnast og duga lógargreinar. Fatan av tí søguliga og samfelagsliga høpi, sum lóg og løgfrøði er partur av, er eisini av stórum týdningi. Løgfrøðingar mugu hava væl mentar førleikar í løgfrøðiligari greining, løgfrøðiligari hugsan og brúki av løgfrøðiligum grundreglum í síni argumentatión og samskifti.

Útbúgvingarnar í lóg á Fróðskaparsetrinum eru lagaðar til hesa fatan. Kortini er ikki møguligt at leggja hesar fortreytir niður í lesandi frá grundini av, men einans at menna víðari tað, sum tey hava við sær frá lívinum, skúla, miðnámsskúla og øðrum viðkomandi útbúgvingum og royndum.

Endamálið við upptøkuroyndini er tískil at kanna, um umsøkjarar hava nøktandi av grundleggjandi førleikum til at mennast víðari á løgfrøðiútbúgvingini.

Umsøkjarar væntast at hava ávísa vitan um løgfrøði frammanundan. Hetta skal framganga av viðkomandi prógvum. Sjálv upptøkuroyndin er hinvegin ikki ætlað at avdúka vitan, men heldur *fatan*, *hugsan*, *loysn av trupulleikum* og evni til at *samskifta greitt og samanhangandi* á føroyskum, donskum og enskum.

## Um royndina sjálva

Royndin kemur at standa í fýra pørtum.

Fyrsti partur verður at skriva eina stutta frágreiðing á 1-2 síður á føroyskum um eitt evni, ið verður avdúkað á staðnum. Endamálið við hesum parti er at avdúka evnini til skynsama og samanhangandi skriving á góðum føroyskum máli.

Síðan verður ein nærri ásett uppgáva eisini avdúkað á staðnum í at gera viðmerkingar á føroyskum til ein tekst á føroyskum, á donskum til ein tekst á donskum og á enskum til ein tekst á enskum. Svarið skal vera umleið hálva síðu fyri hvørt evni (og á hvørjum máli). Hesin partur er ætlaður at vísa, hvussu umsøkjarin er fyri í føroyskum, donskum og enskum máli. Umsøkjararnir hava atgongd til orðabøkur, eitt nú á alnetinum, undir loysnini av hesi uppgávu. Endamálið er at avdúka, hvussu væl umsøkjarin er fyri at skilja og uppbyggja tekstir á hesum trimum málum, sum øll hava stóran týdning fyri lesturin.

Harnæst verður ein spurningur, ið skal vísa evnini til logiska og kritiska hugsan. Umsøkjarin verður tí biðin um at gera viðmerkingar til nøkur hugsað uppáhald og niðurstøður. Avgerandi er, at umsøkjarin dugir at avdúka styrkir og veikleikar í tí, sum verður pástaðið, og hugsunarháttinum, sum liggur aftanfyri. Fortreytin fyri at svara hesum triðja spurningi væl er ikki, at umsøkjarin kennir fagliga heimspeki ella logikk, men heldur at umsøkjarin hevur vanlig góð evni til logiska og kritiska hugsan.

Sum tað fjórða skal umsøkjarin loysa eina hugsaða ósemju ella eitt trupult mál frá gerandislívinum. Spurningurin krevur onga løgfrøðiliga ella aðra serliga vitan, men evnini til at loysa gerandisligar avbjóðingar siga nakað um, hvussu umsøkjarin stendur seg í hugsunarhátti, sum er viðkomandi fyri løgfrøðiligt háttalag. Harumframt vil fjórði spurningur krevja umsøkjaran at skriva so mikið, at ein mynd fæst av, hvussu umsøkjarin dugir at skriva føroyskt, og hvussu væl hann ella hon duga at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum.

**Praktiskir upplýsingar**

Umsøkjarar mugu melda til seinast hósdagin 23. juni, kl 12, á LSS@setur.fo.

Umsøkjarar skulu hava samleikaprógv, egna farteldu og forleingjara til streym við, tá royndin verður tann 29. juni.

Uppgávuspurningarnir verða latnir í pappírsformi og á geyma.

Royndin verður dømd anonymt, har tey, sum rætta uppgávusvarini, ikki kenna samleikan á tí, sum hevur svarað, fyrr enn aftaná, at meting av próvtali er gjørd. Í sambandi við tilmelding fáa umsøkjarar tískil eitt nummar, sum skal skrivast á innlatingina. Nærri verður kunnað um tað í sambandi við tilmeldingina.

Uppgávan skal svarast á tí word-skjalinum, ið liggur á geymanum, ið umsøkjarin fær útleverað til royndina.

Umsøkjarin skal konvertera svarið til pdf áðrenn innlating, so sum frægast slepst undan trupulleikum av ymisku sløgum av teldum og telduforritum.

Uppgávusvarini skulu BÆÐI latast inn á nevnda geyma og EISINI sendast á teldupostadressuna LSS@setur.fo

Internet er loyvt, men samskifti við uttanfyristandandi er strangliga bannað og burturvísingargrund.